Hvar blivu fríhandilsavtalurnar av?

Lovaður fríhandilsavtalurnar millmur Føroyar og heimsins lond – hvar blivu tær av?

Johan Dahl
Løgtingsmaður

Landsstýrið sum sat frá 1994 til 98 legði stóran dent á og gjørdi eitt stórt arbeiði, at fáa handilssáttmálar í lag við Eysturevropeisku londini. Hetta var gjørt, tí at landsstýrið metti, at hesi lond seinni fóru at gerast partur av ES, og at tað tí var sera týdningarmikið at gera handilssáttmálar við hesi lond, áðrenn tað hendi.

Hetta vildi stillað Føroyar í eina betri støðu bæði mótvegis londunum sjálvum, og eisini seinni mótvegis ES.

Fríhandilssáttmáli varð undirskrivaður við Estland, og sáttmálin við Pólland var eisini komin væl ávegis til undirskrivingar og havi eg skilt, at hesin kom upp á pláss seinasta valskeið eftir at sambandssamgongan hevði gjørt neyðuga heimarbeiði, so klárt var stórt hjá næstu samgongu at avgreiða málið.

Eisini bleiv tá kunnað um at samráðingar við onnur lond vóru í gongd.

Eftir valið í 1998 sá tað út til, at henda gongdin fór at halda fram.

Í frágreiðing løgmans um uttanlandsmál í 1999 varð sagt, at samráðingar um handilssáttmálar vóru í gongd ella um at fara í gongd við Lettland, Litava, Rumenia, Bulgaria, PLO, Kroatia, Turkaland, Russland, Kanada, Kili, Brasilia, Meksiko og Marokko.

Tann 15. juni 1999 varð eitt upprit um fríhandilssáttmálar millum »Føroyar og heimsins lond« sent uttanlandsnevndini. Har mælir løgmaður til at Føroyar fara undir samráðingar við londini, ið eftir eru at gera sáttmála við í Evropa umframt Kanada, Avstralia, Nýsæland, Suðurafrika, Meksiko, Kili og Brasilia. Harumframt verður mælt til, at onnur lond enn tey umræddu verða tikin við so hvørt sum fyrisitingarliga orkan røkkur til og treytað av at londini svara fráboðanini um at gera fríhandilssáttmála játtandi.

Kundi verið sera áhugavert at fingið at vita hvussu langt allar hesar avtalusamráðingar er komnar og nær væntast kann tær verða effektueraðar??

Í løgmansroðuni 2000 varð sagt, at samráðingarnar við Russland og Lettland um sínámillum fríhandilssáttmálar vóru um at vera loknar. Sagt varð eisini: "sáttmálin við Russland verður væntandi ein fullkomin fríhandilssáttmáli við ongum avmarkingum fyri vøruhandil."

Í løgmansroðuni í 2001 varð sagt: "Í heyst verður sáttmáli undirskrivaður millum Føroyar og Russland um handilsligt og búskaparligt samstarv. Tá hesin sáttmáli er komin í gildi, verða samráðingarnar um ein veruligan fríhandilssáttmála millum londini tiknar upp aftur".

Hvat ið blivið er av øllum hinum samráðingunum, sum vóru í gongd ella um at fara í gongd í 1999, varð einki nevnt um í løgmansroðuni 2001, - hvar gekk tað galið ??

Seint á sumri 2001 hoyrdist í føroysku fjølmiðlunum, at russar vóru komnir til Føroya at undirskriva sáttmálan, og at Føroyar sostatt vórðu fyrsta landið í heiminum, sum gjørdi fríhandilssáttmála við Russland. Seinni hoyrdist tó, at russisku umboðini vóru farin avstað aftur, uttan at sáttmálin var undirskrivaður.

13. november 2001 svaraði Anfinn Kallsberg einum fyrispurningi í Tinginum frá Edmundi Joensen um hesi viðurskifti. Í svarinum segði Anfinn millum annað: "Ein sokallaður MFN sáttmáli við Russland,ið fer at skapa munandi frægari útflutningssømdir fyri Føroyar, verður eftir ætlan undirritaður tíðliga í vetur...."

Í løgmansroðuni í 2002 varð sagt: "Samráðingarnar við Russland um fríhandilssáttmála hava verið langar og truplar. Enn er ov tíðiliga at siga nakað við vissu um nær komið verður á mál, men landsstýrið heldur fram við, at fáa sáttmála í lag við Russland."

Hetta sigur ikki sørt um, hvussu menn hava fyrigykla vinnuni gyltar ætlanir og møguleikar sum skulu avtakað allar handilsforðingar okkara við útheimin, tó uttan at nakað av týdningi er avklára enn.

Vónandi verður tó nu henda avtalan við Russland undirskrivað av russum ein av nærmastu døgunum, tí her liggur ein stórur marknaður bæði fyri laks, síl og uppisjóarfisk og uttan ivað onnur fiskasløg við, sum vit kunnu leverað.

Tað er ongin ivið um at tað er sera umráðandi at fáa so góðar avtalur sum yvirhøvur gjørligt til vinnuna, so útflutningur okkara hevur best møguligu treytir á marknaðunum.

Vónandi er hetta eitt av aðalmálunum hjá løgmanni og uttanlandsdeildini á løgmansskrivstovuni, at fáa tær avtalur sum er okkara hjartamál uppá pláss ongantíð ov skjótt.

Tað hevði verið uppá sítt pláss at løgmansskrivstovan greiddi okkum frá hvussu langt er komið áleiðis í hesum arbeiðinum við "Fríhandilssáttmálum við Heimsins lond" , - so vit vistu hvar vit stóðu í hesum málið.

Gjaldoyru positivt árin á lánsbrøv

MARKNAÐARRÁK

Seinasta vika gjørdist, eins og vikan frammanundan, ein sera positiv vika fyri lánsbrøv. Longu í byrjanini av vikuni tóku lánsbrøv dik á seg, eftir at amerikanski fíggjarmálaráðharrin John Snow hevði givið ábendingar um, at politiska stevnumiðið um at varðveita ein sterkan dollar nú hevur minni týdning. Beinanvegin styrknaði evran mótvegis dollaranum. Evran er styrknað nógv seinastu dagarnar og er um at gerast eitt haft um beinið á tí frammanundan veika evropiska búskapinum. Ein sterk evra minkar um kappingarføríð hjá evropiskum virkjum og hervið møguleikunum fyri einari framgongd. Avleiðingin gjørdist, at evropisk lánsbrøv, og sostatt eisini donsk, hækkaðu munandi mánadagin, og hækkingin helt áfram so at siga alla vikuna.

Hóast lánsbrøv hava havt eina sera góða viku, hevur hetta sum heild ikki havt negativ árin á partabrøv. Í høvuðsheitinum hava láns- og partabrøv seinastu vikuna sostatt aftur sveiggjað ótengd hvør at øðrum. Meðan lánsbrøv hava eyguni meira eftir gjaldoyragongdini og vantandi prísvøkstri, hava partabrøvini meira eyguni eftir bjartari búskaparligum útlitum seinni í ár, sum fara at stimbra inntøkurnar.

Fríggjadagin setti danski tjóðbankin sokallaðu reporentuna niður við 0,05%-stigum. Hetta hevði so at siga onga ávirkan á marknaðin, men fleiri rentuniðursetingar eru í væntu. Komandi dagarnar verður tað væntandi framvegis gongdin í leiðandi gjaldoyrunum, sum kemur at hava høvuðsávirkanina á lánsbrævamarknaðirnar. Eisini hóttanin um framhaldandi yvirgang kann ávirka. Av hesi orsøk meta vit, at rákið við fallandi rentum kann halda áfram. Verður hugt nakað longur frameftir, er avgerandi spurningurin, um ávaringarnar um vantandi prísvøkstur í USA verða staðfestar.

Seinasti roknskapurin av týdningi, ið er almannakunngjørdur, er tann hjá amerikanska virkinum Hewlett Packard, ið staðfesti tí sum heild positivu gongdina, vit hava sæð seinastu vikurnar. Partabrøv hava staðið seg sera væl í seinastuni og tí kann hugsast at íleggjarar fara at staðfesta vinning. Partabrøv standa kortini stinn í løtuni, og útlit eru fyri, at hesi fara at liggja hægri við ársenda enn nú.

Rentur

	Renta	+/- %-stig
Diskonto	2,50%	0,00%
2 ára lánsbrævi	2,54%	-0,06%
5 ára lánsbrævi	3,14%	-0,07%
10 ára lánsbrævi	3,89%	-0,10%

Partabrævavísitol

	Kursur	+/- %
KFX, Danmark	206,6	0,6%
OMX, Svøriki	498,1	-1,3%
DJ Stoxx 50, Evropa	2266,6	0,2%
S&P 500, USA	933,2	1,4%

Íløgufeløg

	Kursur	+/- %
Lánsbrøv í DKK	107,3	0,4%
Evru Lánsbrøv	167,6	0,6%
Norrøn Partabrøv	60,4	-0,5%
Altjóða Partabrøv	65,6	-1,4%

Gjaldoyra

	Kursur	+/- %
USD	628,35	-1,3%
EUR	742,43	0,0%
GBP	1031,07	-0,9%
NOK	94,10	0,8%

Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.

Vika 22, 2003
www.kaupthing.fo

Gamlar teoriir og fíggjarpolitikkur

Magni Laksáfoss
Streymnes

Annita á Fríðriksmørk hevur nakrar viðmerkingar til viðtalu mína við Sosialin tann 16. mai.

Eg vil nýta høvið til at ynskja Annitu vælkomna aftur av barnburðarfarloyvi.

Í míni viðtalu við Sosialin vóru tveir spurningar viðgjørdir:

Annað er kjakið um lønarspurningin - tvs.: Hví eru lønarkrøvini so stór? Vil ein skattalætti minka um lønarkrøvini? Hevur fíggjarpolitikkurin ávirkan á lønarkrøvini?

Hitt evnið var um búskaparútlitini komandi árini og hvørjir trupuleikar kunnu standast av eini møguligari niðurgongd í búskapinum.

Eg vil ikki nýta hesa greinina til at svara Annitu aftur, tí eg meti at hon hevur skilt boðskapin í viðtaluni. Eg vil heldur nýta plássið í greinini til at fara eitt sindur longur við nøkrum av hugleiðingunum.

Gamlar teoriir

Spurningurin um hvat ávirkar lønargongdina og hvussu lønin verður ásett, hevur verið viðgjørd av búskaparfrøðingum í mong ár. Tískil eru eisini mangar teoriir um hetta evnið. Í viðtaluni gav eg eina mynd av, hvussu flestu búskaparfrøðingar og lærubøkur í dag síggja veruleikan.

Eitt búskaparfrøðiligt / teoretiskt kjak um lønarvøkstur o.l. er neyðugt, tí vit í Føroyum í dag hava nógvar gamlar teoriir hangandi, sum als ikki verða nýttar aðrastaðni longur.

T.d. var í 1974 ein heimskend (heimskend millum búskaparfrøðingar) samrøða inni á eini matstovu í Washington, har Art Laffer teknaði eina mynd niður á ein serviett. Henda myndin er seinni kend sum Lafferkurvan. Ronald Reagan nýtti Laffer-kurvina til at føra skattapolitikk eftir í 80'unum. Í stuttum gongur henda teoriin út uppá, at um vit lækka skattin vil hetta geva fólki hug at arbeiða meiri og skapa økt virksemi, sum harvið vil økja skattainntøkurnar.

Reaganomics - sum búskaparpolitikkurin hjá Ronald Reagan varð kallaður - mundi kollsiglt amerikanska búskapin, tí hallið á almenna kassanum gjørdist so stórt, og tí USA umbroyttist frá at vera eitt land við stórari nettoogn uttanlands gjørdist eitt land við stórari nettoskuld til útlond. Seinni hava nógvar útrokningar víst - m.a. útrokningar hjá Alan S. Blinder - at Laffer-kurvan als ikki hevur tað skapið sum búskaparfrøðingarnir aftanfyri Reaganomics trúði at hon hevði. Tískil er tað fáur búskaparfrøðingur, sum vil nýta argumentir frá Laffer-kurvini í dag.

Hóast hetta, so er henda teoriin tann sama sum Fólkaflokkurin ber fram ferð eftir ferð, nevniliga at skattalætti førir til øktar skattainntøkur.

Veruleikin er tann beint øvugti, nevniliga at skattalættar, í flest øllum førum, geva minni pening í skattainntøkum.

Lønarvøkstur og skattalætti

Á sama hátt sum Laffer-kurvan hevur verið viðgjørd nágreiniliga av búskaparfrøðingum, er spurningurin um samanhangin millum skattalætta og lønarvøkstur eisini nágreiniliga viðgjørdur.

Nógvar teoriir hava ígjøgnum tíðirnar verið frammi um, at ein skattalætti førir til lægri lønarkrøv. Í dag meina flestu búskaparfrøðingar, at møguliga (møguliga merkir, at tað ikki kann avvísast) vil ein skattalætti minka um lønarkrøvini uppá stutt sikt. Uppá langt sikt er semja um, at býtið av inntøkuskapanini í búskapinum millum løn og restinntøku er konstant. (Restinntøkan er tað sum virkið hevur eftir aftaná rakstur - tvs. til íløgur og avlop). Vanliga verður sagt at býtið millum løn og restinntøku er 1/3 til restinntøku og 2/3 til løn.

Vit kenna eisini hetta aftur í gerandisdegnum - t.d. argumentið sum arbeiðarafeløgini plaga at koma við: "Vit vilja hava okkara part av vøkstrinum!" ella at "vit vilja hava okkara part av køkunni!". Hetta er kravið um teir tveir tríðingarnar av inntøkuni í búskapinum.

Konstanta býtið merkir sostatt, at ein skattalætti onga ávirkan vil hava á lønarkrøvini í samráðingunum uppá langt sikt.

Ikki lægri lønarkrøv

Vit kunnu øll vera samd um, at ein skattalætti og ein lønarvøkstur vilja geva somu disponiblu inntøkur (eftir skatt) fyri hvønn einstakan av okkum. Harvið skuldi vit trúð, at vit vóru líkaglað um vit fingu lægri lønarkrøv, men tvørturimóti til hægri lønarkrøv.

Føroyskur fíggjarpolitikkur

Í Føroyum hava vit avmarkaða nøgd av stýringsamboðum til búskapin. T.d. kunnu vit ikki føra valutapolitikk ella peningapolitikk. Onnur stýringsamboð eru eisini burtur.

Tískil hevur fíggjarpolitikkurin so stóran týdning fyri okkum sum stýringsamboð og tískil mugu vit duga væl at umsita fíggjarpolitikkin.

Í Føroyum hava vit seinastu 30 árini altíð fört ein konjunkturviðgangandi fíggjarpolitikk. Hetta vil siga, at vit brúka úr kassanum tá tíðirnar eru góðar, og halda aftur tá tíðirnar gerast verri.

Hetta svarar til, at Jósef í Egyptalandi brúkti alt kornið í teimum sjey góðu árunum og kravdi meiri korn frá fólkinum í ringu árunum, hóast tey onki korn áttu. Hetta er einki minni enn ein katastrofa!!!

Hesin fíggjarpolitikkur hevur eisini verið førdur seinastu fimm árini.

Seinastu fimm árini hevur landskassin økt sínar rakstrarútreiðslur úr góðum tvær til góðar tríggjar milliardir. Hetta er ein ekspansivur fíggjarpolitikkur sum vil nakað - í allar bestu tíðum - gulltíðum.

Fyrsta treytin fyri at kunna seta gongd í búskapin í ringum tíðum er, at tú hevur eitt avlop í góðum tíðum. Hetta avlopið er minkað niður í null í ár. Hvat kunnu vit nú gera um tíðirnar gerast verri???

Vit mugu duga betur at umsita fíggjarpolitikkin í Føroyum. Tað nyttar ikki at vit ferð eftir ferð skulu renna okkum føst vegna vánaligari stýring.

Høvuðsendamálið við fíggjarpolitikkinum skal vera, at tryggja eina javna búskapargongd. Hetta má og skal vera fremsta málið við fíggjarpolitikkinum.

Fíggjarpolitikkur og lønarvøkstur

Í viðtaluni í Sosialinum var eg inni á, at fíggjarpolitikkurin hjá samgonguni hevur høvuðsábyrgdina av at lønarkrøvini eru so stór.

Einki er at ivast í, at tað er sera stóra trýstið á búskapinum, sum hevur fört til stór lønarkrøv. Trýstið stavar frá øktum fiskaprísum, øktari fiskanøgd og fíggjarpolitikkinum. Vit kunnu neyvan geva fiskaprísi og fiskanøgd skyldina fyri yvirupphitingini - vit eiga heldur at vera takksom fyri at okkum eru givin nøkur góð fiskiár. Einasti veruligi syndari í hesum er fíggjarpolitikkurin, tí hann skal jú lagast eftir gongdini í restini av búskapinum so at vit fáa eina javna gongd.

Henda samgongan hevur fört ein óforsvarligan fíggjarpolitikk, við tað at almennu útreiðslurnar eru øktar ófatiliga nógv seinastu fimm árini. Lítið og onki er lagt inn á goymslu og vøksturin í almennu útreiðslunum hevur fört til yvirupphiting av búskapinum.

Lønarvøkstur er tekin um eitt trýst sum hevur verið á búskapinum í eina tíð - t.d. sum nú av førda fíggjarpolitikkinum.

Einki er at ivast í, at førdi fíggjarpolitikkurin hevur høvuðsábyrgdina av at lønarkrøvini eru sum tey eru.

Útlitini komandi árini

Eftir sjey góð ár koma sjey ring ár. Soleiðis var í Egyptalandi og soleiðis sigur søgan okkum at gongdin plagar at vera í Føroyum. Smá lond eru serliga viðbrekin fyri búskaparligum sveiggjum. Hetta setur Føroyar í serstøðu, tá Føroyar verða sammettar við størri lond. Ein stórur partur av samlaða eftirspurninginum hjá einum lítlum landi er undirgivin ávirkanum, sum vit hava lítið og einki tamarhald á.

Eitt lítið land sum Føroyar eigur av hesi orsøk at hava eina upphædd tøka at standa ímóti við. Henda upphædd skuldi verið á leið eitt árs BTÚ - í dag er hetta uml. 10 mia. kr.

Búskaparfrøðingar kunnu líka illa sum onnur spáa um framtíðina, tí hon er nært tengd at fiskanøgd og fiskaprísi og gongdina í hesum kenna nógv onnur betur til enn búskaparfrøðingarnir.

Tó kunnu vit siga nakað um hvussu væl ymisku sektorarnir eru fyri at taka ímóti einum møguligum bakkasti. Tað var hetta eg royndi at gera í viðtaluni í Sosialinum.

Vit kunnu fyri vissu siga, at landskassin ikki er væl fyri at taka móti einum bakkasti. Onki avlop er á fíggjarlógini, skuldin er stór og uppsparingin lítil.

Avleiðing fyri Landskassan

Mín meting er tískil, at fyri at landskassin skal klára seg komandi árini, mugu uppgávur flytast yvir á kommunurnar (uttan at fult endurgjald verður latið kommununum) og samstundis má peningur nýtast av uppsparingini í Landsbankanum og møguliga má skatturin hækkast ella einhvør lántøka má fremjast - uttanlandalán ella innanlandalán.

Um vit skulu meta um hvussu skjótt tøki peningurin í Landsbankanum er tømdur, kunnu vit rokna soleiðis:

Í bankanum standa 2,4 milliardir.

Av hesum eru 1,5 milliardir bundnar (lógarásett innistandandi í Landsbankanum)

Eftir eru 900 milliónir tøkar.

Í ár mugu vit brúka 150 milliónir til avdráttir og aðrar 150 milliónir gerast bundnar við tað at lógarásetta kravið økist frá 1,5 til 1,65 milliardir.

Hervið minkar tøki peningurin við umleið 300 milliónum longu við árslok í ár.

Eftir eru nú umleið 600 milliónir.

Um gongdin heldur áfram við somu ferð er ongin tøkur peningur um tvey ár.

Tá má skatturin hækkast ella lán takast.

Hetta verður ikki sagt tí at eg ynski at skatturin skal hækka. Ei heldur ynski eg at landskassin má út at lána pening. Hetta er bert ein avleiðing av tí førda fíggjarpolitikkinum. Um vit ikki duga at seta pening til síðis í góðum tíðum, er avleiðingin tann sum er skitserað omanfyri.

Forvitnislig kórvitjan

Fuglafjarðar sangkór fær vitjan av Midnattskören úr Lund í hesi vikuni

KÓR

Frits Johannesen

Fjør vár var Fuglafjarðar sangkór á konsertferð í Norður-jyllandi, Svoríki og Keypmannahavn. Kórið vitjaði í Lund og var gestur hja Midnattskören í hesum býi. Kórleiðari er Gösta Petersen, sum er ein sera fjøllbroyttur kórleiðari - er góður harmonikuspælari, og hetta ljóðførið nýtir hann nógv, tá ið hann leiðir kórið. Kórið syngur svenskan kórsang, fjølbroyttan fólkatónleik úr ymsum heraðshornum, men hevur eisini kirkju- og norðurlendskan kórtónleik við á skránni. Gösta Petersen er eisini tónaskald, og fara vit eisini at hoyra løg, sum hann sjálvur hevur skrivað.

Midnattskören kemur týsdagin 27. mai og fer avstað aftur mánadagin 1. juni.

Mikukvøldið 28. mai kl. 20:00 hevur kórið konsert í Eiðis kirkju.

Hósdagin 29. mai kl. 16:00 - Kristihimmalsferðardagur, skuldi kórið hava konsert í Norðurlandahúsinum, men vegna verkfallið, verður konsertin flutt í annað høli í Havnini og verður lýst um hetta í Útvarpinum og bløðunum.

Friggjadagin 30. mai kl. 20:00 fara Midnattskören og Fuglafjarðar sangkór at hava konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Leygardagin 31. mai kl. 19:00 hevur kórið konsert í Kristjanskirkjuni í Klaksvík.